# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eingin sleppur at stjala pengar frá fólki uttan hevnd, og tí fara vit skjótt at beina fyri tær*

*(bræv til amerikanskan bankastjóra)*

# Greenspan viðgongur mistøk

**Fyrrverandi amerikanski tjóðbankastjórin Alan Greenspan viðgekk í einari hoyring í gjár, at hann hevði gjørt mistøk**



*Alan Greenspan í Komngressini: -Eg fati framvegis ikki, at tað skuldi enda soleiðis*

(Mynd: Polfoto)

Alan Greenspan var í gjár til avhoyringar í Kongressini, sum vildi hava hansara boð uppá, hvussu USA kundi koma út í eina so álvarssama fíggjarkreppu, sum hevur herjað landið og stóran part av heiminum í seinastuni.

Fyrrverandi tjóðbankastjórin vildi ikki átaka sær ábyrgdina av tí, sum er hent, men hann ásannaði, at kreppan hevur víst, at hann gjørdi eitt mistak, tá hann setti seg upp ímóti øllum ætlanum um at avmarka virksemið hjá fíggjarstovnunum innan fyri ávísar karmar.

Alan Greenspan viðgekk, at hann var ovfarin av, at tann amerikanski fíggjarmarknaðurin var rapaður, men hann segði seg vænta, at bankarnir verða førir fyri at tryggja innskotið hjá partaeigarunum og eginpeningin.

– Eg og mong við mær hildu, at bankarnir høvdu sjálvir áhuga í at verja eginpeningin og partaeigararnar, og tí eru vit skelkað í dag og hava ilt við at trúgva tí, sum vit hoyra og síggja, segði gamli tjóðbankastjórin við ta serligu eftirlitsnevndina hjá Kongressini.

### Nógv verri enn væntað

Alan Greenspan viðgekk, at hann hevði mistikið seg, og hann segði, at hann hevur framvegis ilt við at skilja, hvat tað var, sum hendi, tá bankarnir lótu fíggjarmarknaðin rapa.

-Tað var ein av hornasteinunum í skipanini við marknaðarkapping og frælsum marknaði, sum sakk. Eg skilji framvegis ikki rættiliga, hví tað hendi, segði hann.

Hann ásannaði eisini, at hann mistók seg, tá hann sum tjóðbankastjóri hevði sagt, at tað var eingin orsøk til at stúra fyri, at tann hækkandi bústaðarprísurin fór at elva til spekulasjón og kundi enda sum ein bløðra, ið kundi skaða allan búskapin, tá hon eina ferð fór at bresta. Hann hevði havt ta uppfatan, at bústaðarprísurin kundi ikki fella um alt landið ísenn, tí bústaðarmarknaðurin er ein lokalur ella staðbundin marknaður.

Alan Greenspan viðgekk eisini, at fíggjarkreppan er vorðin nógv verri, enn hann hevði ímyndað sær. Hann umrøddi kreppuna sum eina kreditt-flóðaldu, sum bara kemur eina ferð í hvørjari øld, og hann segði, at mong mugu fyrireika seg til arbeiðsloysi og verri tíðir.

### Lítillátin

Sum amerikanskur tjóðbankastjóri hevði Allan Greenspan stórt vald, og tað bleiv lurtað eftir orðum hansara. Eisini tær ferðirnar hann kunnaði Kongressina um landsins fíggjarviðurskiftir. Men í gjár var tað ein lítillátin og varin maður, sum svaraði spurningum frá kongresslimum, sum vóru meiri ágangandi, enn teir plagdu at vera fyrr.

Millum teir mest ágangandi konkresslimirnar var demokraturin Henry Waxman, sum er formaður í eftirlitsnevndini hjá Kongressini. Hann segði, at sum tjóðbankastjóri hevði Alan Greenspan havt til uppgávu at avdúka trupulleikar í búskapinum, áðrenn teir elvdu til kreppu.

- Tú sigur nú, at tú varnaðist tað ikki, men í mínum eygum er tann frágreiðingin ikki nóg góð, segði Henry Waxman og spurdi Greenspan beinleiðis, um hann hevði mistikið seg.

Nógvir serfrøðingar vísa á, at høvuðsamboðið hjá Alan Greenspan sum tjóðbankastjóra var at halda rentuni sera langt niðri, og at tað var júst hesin politikkurin, sum elvdi til, at fólk sluppu at taka nógv størri búsðararlán, enn tey vóru før fyri at gjalda afturt, tá rentan hækkaði.

Tað vóru serliga demokratarnir í eftirlitsnevndini, sum settu tí gamla tjóðbankastjóranum ágangandi spurningar. Tey republikonsku umboðini valdu í størri mun at finnast at realkredittfeløgunum Fannie Mae og Freddie Mac, sum teir løgdu undir at hava ríkið ein ábyrgdarleysan útlánspolitikk.

**STUTT SAGT**

## Brúktu ikki mjólkarkvotuna

Tað gongst illa hjá bóndrunum í ES-londunum at fylla mjólkarkvoturnar, sum hvø'rt land sær hevur fingið tillutað. Tøl vísa, at í fjør høvdu 20 av teimum 27 limalondunum trupulleikar at framleiða ta mjólk, sum tey høvdu fingið kvotu til. Tað bar í sær, at framleiðslan var 2,6 milliónir tons minni enn kvotan.

Tað var ymiskt, hvussu langt tey einstøku londini vóru frá kvotuni, men tað var serliga Rumenia, sum hevði ilt við at fylla kvotuna, tí har lupu ikki minni enn 30 prosent av kvotuni av. Í Bulgariu og Litava restaðu 15 prosent í, í Svøríki 12 prosent og í Ungarn 11 prosent. Í Grikkalandi, Letlandi, Estlandi, Slovakia, Finnlandi, Slovenia og Bretlandi vóru millum 5 og 10 prosent av mjólkarkvotuni eftir, tá árið í fjør var liðugt.

Danmark er eitt av teimum mest framkomnu landbúnaðarlondunum í heiminum, og donsku mjólkarbøndurnir vóru eisini neyvari enn teirra starvsfelagar í hinum ES-londunum. Tá árið bleiv uppgjørt, hvøddu donsku mjólkarvirkini fingið 4.497.470.537 kilo av mjólk, og tað svarar til 99,95 prosent av teirri donsku kvotuni, sigur DR-kringvarpið.



*ES-bøndurnir megna ikki at framleiða ta ásettu mjólkarkvotuna*

(Mynd: DR)

# Kampusch-málið kannast av nýggjum



**Ákæruvaldið vil hava greiði á, um maðurin, sum burturflutti Nataschu Kampusch, fekk hjálp frá øðrum**

Eysturríkska Natascha Kampusch sat fangi í kjallaranum hjá Wolfgang Priklopil í meiri enn átta ár.

*Natascha Kampusch*

(Mynd: Polfoto)

Men var hann einsamallur um illgerðina?

Tann spurningurin hevur verið frammi fleiri ferðir, síðani Natascha Kampusch slapp leys, og nú hevur innanríkisráðharrin gjørt av, at málið skal í rættin eina ferð afturat fyri at fáa greiði á, um Wolfgang Priklopil var einsamallur, ella um hann fekk hjálp til at burturflkyta gentuna og til at halda henni sum fanga í meiri enn átta ár.

Í fyrsta umfari hevur innanríkisráðharrin gjørt av at seta eina serliga nevnd at kanna spurningin.

Tann 10 ára gamla Natascha Kampusch bleiv burturflutt í 1998. Átta ár seinni, í august í 2006, eydnaðist tað henni at flýggja. Wolfgang Priklopil tók lívið av sær.